# Vegleiðing til tøku av roðslu og útfylling av brævbjálvum

Roðslan skal takast omanfyri síðulinjuna, millum ryggfjøðurina og fitifjøðurina, sum víst á tekningini og á baksíðuni á roðslubrævbjálvanum. Roðslan skal koyrast beinleiðis í brævbjálvan, og bert ein brævbjálvi skal nýtast til hvønn fiskin. Brævbjálvin skal turkast við stovuhita og síðani sendast inn til okkara. Fiskaaling rindar postgjald.

**Livandi fiskur**: Tak roðsluna av við eini pinsett e.l. (5 frá hvørjari síðu). GG: IKKI SKAVA SLIPUNA AV *(fiskurin kann fáa bruna)*. Fiskurin verður róligari, um tú leggur ein klút ella líknandi fyri eyguni.

**Deyður fiskur**: Turka slipuna av fiskinum áðrenn roðsluprøvarnir verða tiknir við knóvi. Tak í minsta lagi 30 roðslur.




## Brævbjálvin skal fyllast út soleiðis:

Navn á tí, sum hevur fiskað fiskin.

Fiskistað: Ósin og bygdin, har fiskurin varð fiskaður.

Eitt fartelefonnummar, har tað er møguligt at senda upplýsingarnar um fiskin til, og til lutakastið.

Nær fiskurin er fingin (dagur/ár).

Slag av fiski: Sjósíl (**S**), laksur (**L**), ælabogasíl (**Æ**), kúlulaksur (**K**), ella ókent (**Ó**).

Heildarlongd verður mátað av fiskinum, t.e. frá kjaft til og við stert, í cm.

Vektin verður máld í grammum. Heildarvektin á fiskinum er ein fyrimunur, men kruvd vekt er eisini í lagi. Viðmerk á brævbjálvan, hvør av vektunum er nýtt: **H** fyri heildarvekt og **K** fyri kruvda vekt.




Er nøkur lús á fiskinum, verður talið á teimum skrivað á her.

Kall- (Kall) ella kvennfiskur (Kvenn).

Tað hevði eisini verið ein sera stór hjálp at fingið mynd av fiskinum. Mynd/ir kunnu sendast til fiskur@fiskaaling.fo.

Viðmerk navn, dato, longd, vekt so vit fáa sett upplýsingarnar frá myndunum og brævbjálvunum saman.

**Tørvar tær fleiri bjálvar - ring til Fiskaaling á tel. 474747 ella skriva til fiskur@fiskaaling.fo**

**Laksur**



© Astrid Andreassen

**Síl**



© Astrid Andreassen

**Ælabogasíl**



© Astrid Andreassen

Roðslan kann siga okkum, hvussu gamal fiskurin var, tá ið hann fór úr ánni, hvussu leingi fiskurin hevur verið á sjónum, hvussu skjótt hann er vaksin, og um hann hevur gýtt.

Við einum væl útfyltum brævbjálva eru tit eisini við til at geva okkum kunnleika um hvar og nær, fiskurin varð fingin, og kann hetta verða nýtt til at fáa eina ábending um útbreiðsluna av sjósílum í Føroyum.

Tá ið vit hava lisið roðsluna, fáa tit eitt sms við vitanini, ið roðslan gav okkum. Fiskaaling takkar fyri allan stuðul og luttøku, sum frítíðarfiskarar kunnu veita í sambandi við hesi spennandi og týdningarmiklu verkætlanini.

**Kúlulaksur,** *kvennfiskur*



**Kúlulaksur,** *kallfiskur*



Fiskaaling fylgir eisini gongdini við kúlulaksi í Føroyum. Øll, ið hava fingið kúlulaks, ella sum hava viðkomandi upplýsingar, eru vælkomin at venda sær til Kirstin Eliasen, granskara, á telefon 774703 ella kirstin@fiskaaling.fo.

Umframt kúluna, ið siljafiskurin fær í gýtingartíðarskeiðnum, er eitt eyðkenni fyri kúlulaksin, at hann hevur hvítan kjaft við svørtum góma.

*við Áir, mars 2023*

Fiskaaling